gult26 cyan26 magenta26 svart26



# Sosialurin fyrstur á gøtuni

## Fæst í leysasølu kring landið kl.:




## Fá blaðið í postkassan kl. 19.00

Tíðindablaðið
**Sosialurin**
BOX 76
FO-110 Tórshavn

ÓKEYPIS

Undirritaði teknar seg sum haldara av Tíðindablaðnum Sosialurin, og til blaðið 5 ferðir um vikuna.

Navn:
Bústaður:
Postnr./bygd/býur:
Tlf.:
Undirskrift:

☐ Haldarar í Føroyum: 360,-/ársfj.
☐ Haldarar í Europa: 510,-/ársfj. ☐ Onnur lond: Ymiskir prísir
☐ 5 bløð um vikuna í Europa: 425,-/ársfj.

Teir haldarar ið hava postnummar 100, 160, 187, 188, hava nú møguleika at fáa blaðið borið til dyrnar kl. 19.00.
Fyll lepan út og send hann til okkum.

gult27 cyan27 magenta27 svart27



HEILSUFRØÐILIGA STARVSSTOVAN

Debesartrøð
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands
Tel. +298 31 53 00
Fax. +298 31 05 08
E-mail: foodagency@hfs.fo

FOOD AND ENVIRONMENTAL AGENCY

## Laborantur til evnafrøðiligu kanningarstovuna

Heilsufrøðiliga starvsstovan søkir eftir laboranti til nýtt starv á evnafrøðiligu kanningarstovuni. Starvið fevnir um vanligar kanningar av matvørum, drekkivatni og umhvørvissýnum.

Tú skalt hava lokið prógv sum laborantur og helst hava royndir innan vanligar kemiskar kanningar, góðskustýring og EDV á arbeiðsstaði. Royndir innan nútímans evnafrøðilig tól sum AAS er ein fyrimunur.

Tú skalt hava góð samstarvsevnir, vera nærlagdur/ nærløgd og duga at arbeiða miðvíst og sjálvstøðugt.

Á evnafrøðiligu kanningarstovuni eru í løtuni 4 laborantar, ein kemikari og ein deildarleiðari. Kanningarstovan er altjóða góðkend samsvarandi EN 45001 og er undir eftirliti av DANAK (Dansk Akkreditering).

Fleiri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Maritu Poulsen, deildarleiðara, tlf. 31 53 00.

Starvið verður lønt samsvarandi sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið í 15. lønarflokki, sí heimasíðuna hjá Lønardeildini: www.lnd.fo.

Umsókn til starvið, við avriti av prógvum, starvsroyndum og møguligum viðmælum skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 23. apríl 2001. Starvið verður sett 1. mai 2001 ella skjótast til ber.

## 3 laborantar til mikrobiologisku kanningarstovuna

Heilsufrøðiliga starvsstovan søkir eftir 3 laborantum til mikrobiologisku kanningarstovuna, harav eitt er nýtt starv.

Størvini, sum eru fulla tíð, fevna um vanligar mikrobiologiskar kanningar av mati, drekkivatni og øðrum. Seinni kann starvsøkið møguliga broytast.

Tú skalt hava lokið prógv sum laborantur. Royndir innan vanligar mikrobiologiskar kanningar, góðskustýring og EDV á arbeiðsstaði eru ein fyrimunur, men eingin treyt.

Tú skalt hava góð samstarvsevni, vera nærlagdur/ nærløgd og duga at arbeiða miðvíst og sjálvstøðugt.

Á kanningarstovuni eru í løtuni 5 laborantar, eitt hjálparfólk og ein akademikari. Kanningarstovan hevur søkt um DANAK góðkenning.

Fleiri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til Birnu Mortensen, deildarleiðara, tlf. 315300.

Størvini verður lønt í 15. lønarflokki samsvarandi sáttmálanum hjá Starvsmannafelagnum. Sí heimasíðuna hjá Lønardeildini: www.lnd.fo.

Umsóknir til størvini, við avriti av prógvum, starvsroyndum og møguligum viðmælum skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 23. apríl 2001. Størvini verða sett 1. mai 2001 ella skjótast til ber.

## Hjálparfólk til mikrobiologisku kanningarstovuna

Heilsufrøðiliga starvsstovan søkir eftir einum hjálparfólki til mikrobiologisku kanningarstovuna. Starvið, sum at byrja við verður 3/4 tíð, fevnir um:

- substratframleiðslu
- uppvask av kanningarstovuútgerð og
- annað fyrifallandi arbeiði á kanningarstovunum.

Eingi formlig krøv verða sett til útbúgving, men royndir á økinum er ein fyrimunur.

Tú skalt hava góð samstarvsevni, verða nærlagur/ nærløgd og duga at arbeiða miðvíst og sjálvstøðugt.

Starvið verður sett samsvarandi galdandi sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið í 8. lønarflokki, sí heimasíðuna hjá Lønardeildini: www.lnd.fo.

Fleiri upplýsingar fáast frá Birnu Mortensen, deildarleiðara, á telefon 31 53 00.

Umsóknir til størvini, við avriti av prógvum, starvsroyndum og møguligum viðmælum skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 23. apríl 2001. Størvini verða sett 1. mai 2001 ella skjótast til ber.

FÍGGJARMÁLASTÝRIÐ
**Føroya Gjaldstova**

Søkt verður eftir

## hjálparfólki

### til EDV-deildina á gjaldstovuni

Ábyrgdarøkið verður at hjálpa kervisfyrisitaranum at reka EDV-skipanirnar og hjálpa netfyrisitinginum at knýta stovnar í EDV-skipanirnar hjá gjaldstovuni t.e. at leggja inn forrit og uppseta samskifti.

Seinni, sum evni og áhugi er til, verður arbeiðið meira avbjóðandi. Her verður hugsað um t.d. ábyrgd av ávísum uppgávum innan kervisfyrisiting og menningaverkætlanum.

Tær nýtist ikki nakra formliga ella ávísa útbúgving, men tó er tað ein avgjørdur fyrimunur at duga tey mest nýttu forritini sum office-pakkan og kenna til stýriskipanir. Eisini er gott, um tann, ið settur verður, hevur eitt sindur av skili fyri bókhaldi.

Upplæring fer fram við, at yvirtaka smáar lættari uppgávur frá kervisfyrisitinginum, men sum frálíður, verða uppgávurnar størri og meira spennandi. Ein liður í útbúgvingini er ein innføring í virkisøkini á stovninum við tí endamáli at fáa yvirlit yvir funktiónir, arbeiðshættir og samskifti millum skipanir, soleiðis at tann, ið settur verður í tíðini fram til jólar skiftivís kemur at arbeiða á EDV-deildini og hinum deildunum á gjaldstovuni.

Umsóknir skulu vera Gjaldstovuni, Boks 2089, 165 Argir, í hendi innan 26. apríl 2001.

Fyrispurningar kunnu setast Dávi Johannesen á telefon 352400.

## Vága Javnaðarfelag

### Ársaðalfundurin

**verður tann 26. apríl 2001.**

Nærri verður kunngjørt seinni.

Vága Javnaðarfelag

## Idnaðarbygningur í Trongisvági til sølu

Stoypivirki í Trongisvági til sølu um hóskandi boð fæst.

Bygningurin er 360 m².

**0045-98468867 ella 371558**